## Frágreiðing frá skúlastýrinum í Skopunar Skúla.

Forkvinna: Randi F. Hentze

Næstformaður: Hallur Winther

Foreldraumboð: Eivind Kolden

Eyka foreldraumboð: Kitty Mohr Winther og Eliesar Jacobsen

Kommunalt umboð: Gerðhard Lognberg

Kommunalt umboð: Marjun S. Debes

Starvsfólkaumboð: Sára Mary-Ann J. Anthoniussen

Skrivari: Kárun Kjærbo

## Kunning frá skúlastýrinum

Frá tí vit byrjaðu í 2020 hava vit havt 6 fundir um árið, tó eitt sindur ávirka av korona fyrstu árini.

Vit høvdu frá byrjan ymisk uppi og at venda um, hvat hevði størsta týdning at fáa gjørt sum skjótast.

Uppi var at venda, hvussu stovurnar best kundu gagnnýtast í gerandisdegnum, og hvørjum tørvur var á til ymisku lærugreinarnar í gerandisdegnum. Ynski var at fáa ymiskar møblar, sum tørvur var á í skúlanum, t.d skáp, borð og stólar.  Hetta varð játtað og fingið til skúlan. Eisini er bókasavnið dagført við bókum, og gamlar bøkur ruddaðar út.

Skúlastovurnar hava fingið fleiri talvur, hetta fyri at lætta um undirvísingina við tveimum flokkum í somu stovu, og hevur hetta riggað avbera væl.

Stovan til handaverk og list er uppdatera við skápum og við tilfarið, sum tørvur var á. Hetta fyri at fáa meira stýr á tilfarinum, sum tørvur var á til hvørja lærugrein. Eisini eru nýggj borð og stólar keypt til hølið.

Vit í skúlastýrinum hava seinasta árið hava eitt stórt projekt á skránni. Nógv hevur verið tosað seinastu árini um at betra um garðin rundanum skúlan. Tað bleiv í samráð við kommununa avgjørt at vita, hvat kundi gerast við hetta. Vit høvdu fund við Innsport, sum góvu okkum eitt uppskot til

garðin við ymiskum amboðum frá teimum.
Vit høvdu uppskotið uppi at venda í stýrinum og avgjørt bleiv at seta hetta í verk. So avtala bleiv gjørd og lovað bleiv at byrjað varð hálvan mai. Tíanverri helt hendan ætlan ikki og byrjað bleiv tó seinni enn lovað.

Eisini hava vit fingið sett í verk eitt frítíðarskúlatilboð til allan skúlan í Skopunar skúla frá 1. til 5. flokk, ið byrjaði eftir summarfrítíðina 2022. Hetta hevur verið sera væl móttikið og hevur eydnast sera væl.

## Ætlanir

Vit hava ætlanir um at betra um inniluftina í skúlanum, og avgjørt er at fáa eitt útluftingarsystem sett upp á skúlanum í 2024. Hetta er játtað av kommununi at kanna, hvat skal gerast, og fáa hetta sett í verk.

Eisini hevur ynskið leingi verið at betra um ljóðviðurskiftini í stóru høllini. Ymisk er gjørt gjøgnum árini í roynd at betra um tað, men viðgangast má, at tað hevur ikki verið nøktandi. Her er avgerð tikin um at seta trolltekk undir loftið fyri at betra um ljóðið, og vóna vit, at hetta er tað, sum skal til. Hetta verður eftir ætlan gjørt í 2024.

Ynski er eisini at fáa nýggjar møblar inn í skúlastovunar, tí gomlu møblarnir hava tænt fyri seg.

Eisini er ynski at fáa sett evningstovuna í stand í 2024, og fáa gagnnýtt hana meira enn hon verður í dag.

Vegna Skúlastýrið í Skopunar Skúla

Randi F. Hentze forkvinna